KUNNINGARSKRIV

2018

Kunningarskriv 2018

Góðu borgarar í Sørvágs kommunu

Tað hevur verið siðvenja í kommununi, at borgarar okkara við árslok fáa eitt kunningarskriv, har greitt verður frá, hvussu gingist hevur í brátt farna ári, og hvørjar ætlanir bygdaráðið hevur í árinum, sum kemur.

Í hesum tíðum verða vit áhaldandi undirdíkt við kunning og tíðindum um alt millum himmal og jørð á alskyns miðlum, so tíðin er helst farin frá slíkum tíðindaskrivum. Hóast tað, fara vit aftur í ár at skriva eitt stutt kunningarskriv at leggja á heimasíðu okkara. Til ber at fáa eitt eintak í hondina á kommunuskrivstovuni, um onkur ynskir tað.

Fíggjarætlanin 2018

Sambært fíggjarætlanini fyri 2018 var ætlanin at gera íløgur fyri uml. 12.950 mió. kr. í 2018 innan hesi øki:

Almanna- og heilsumál:	1.800.000,-
Børn og ung:	150.000,-
Undirvísing:	300.000,-
Mentan og frítíð:	2.300.000,-
Teknisk mál:	7.200.000,-
Kommunal virki:	1.200.000,-

Tað eru góðar tíðir í landinum í løtuni. Viðgongdin er stór. Vit hava búskaparvøkstur, fólkavøkstur, lítið arbeiðsloysi, hækkandi løntakaratal og lága rentu. Sjálvandi er tað at fegnast um, men tað hevur eisini tað við sær, at ikki gongst altíð sum prestur prædikar, sum tað mangan verður sagt. Tað er viðhvørt trupult at fáa avgreitt tær ætlanir, ið bygdaráðið hevur stungið út í kortið, tí arbeiðstakarar hava nóg mikið at gera, so okkurt má bíða. Tað hava vit eisini tikið til eftirtektar í ár. Peningur, ið var settur av til verkætlanir í 2018, er ikki altíð brúktur sambært ætlan, men er játtaður til onnur átrokandi endamál ella liggur í kassanum sum gjaldføri til íløgur fyri næsta ár.

Hvat er so framt í verki

Eldraøkið var lagt út til kommunurnar at umsita hin 1. januar 2015. Kommunurnar í oynni, ið eru saman um Heimatænastuna, skulu sambært lóg veita okkara gomlu og óhjálpnu eina góða og fjølbroytta tænastu. Um somu tíð var **heimið á Sýnini** yvirtikið, og tí tørvaði stórar ábøtur. Yvirtøkan av heiminum fekk sjálvandi eisini fíggjarligar fylgjur fyri báðar kommunurnar. Landið veitti okkum eitt rentu- og avdráttarfrítt lán upp á 15.750 mió. kr. og eitt rentufrítt lán upp á 15.750 mió. kr.

Avdráttartíðin av láninum frá landskassanum er 13 ár. Hetta lánið verður goldið í mun til fólkatalið, sum var í kommununum við árslok yvirtøkudagin. Okkara kommuna skal avdraga lánið í 4 ár og 8 mánaðir. Sostatt eru vit liðug at rinda okkara part í august 2019. Heimið verður umvælt eftir kostnaðarmeting, sum Landsverk gjørdi. Tá arbeiðið varð útboðið, vísti tað seg, at kostnaðurin var væl hægri, enn mett var frammanundan. Kommunurnar samdust um at hækka sín lut í fíggingini við 5 mió. kr. Okkara lutur í mun til meirútreiðsluna varð 1.8 mió. kr. Sostatt kostar umvælingin í fyrstu atløgu kr. 36.5 mió.

Aftur í ár mugu vit staðfesta, at arbeiðið at umvæla heimið hevur ikki gingið eftir ætlan; tað er tíverri nógv seinkað. Tær báðar ovaru hæddirnar eru tó sum so liðugt umvældar, so neyðugt er ikki at leiga búpláss aðrastaðni longur. Øll búfólkini búgva á Sýnini, og alt skrivstovuvirksemi er staðsett har.

Hin 13. september 2017 var nýggjur bygnaður, ið leggur dent á demens- og heilsufremjandi røkt, góðkendur av stýrinum fyri Heimatænastuna í Vágum. Heimið á Sýnini skal, umframt at vera búfólkunum eitt gott heim í smærri eindum, eisini virka sum ein eldradepil við fleiri tilboðum til bæði búfólk og heimabúgvandi. Í tí sambandi er 3. hædd býtt upp í eldraheim og rehabiliteringsdeild við umlættingarstovum og einari palliativari stovu. Á 2. hædd er eldra- og demensheim við denti á sosialpedagogiska minniskveikjandi røkt. 1. hædd ella kjallarahæddin verður innrættað til heilsufremjandi og sosial tiltøk fyri bæði búfólk, heimabúgvandi, starvsfólk og avvarðandi. Her verður stór venjingarhøll og onnur høli, ið skulu brúkast til fundarvirksemi, undirvísing, andaktir og onnur tiltøk. Arbeiðið at umvæla kjallarahæddina er byrjað og verður vónandi liðugt í ár.

Vegna seinkingina í arbeiðinum, er peningurin, ið var settur av á fíggjarætlanini fyri 2018, ikki brúktur til umvælingina, men peningur er aftur settur av á fíggjarætlanini fyri 2019 til hetta síðsta arbeiðið.

Børn og ung. Tað er sjálvsagt, at kommunan nøktar tørvin á barnaansing og skapar teir karmar, so námsfrøðiliga arbeiðið við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, mennir og mentar børn og ung á fullgóðan hátt. Vit fegnast um, at barnatalið í kommununi er støðugt vaksandi. Í ár hevur verið neyðugt at gera smávegin ábøtur í Alvalon, tí hvør fermetur í barnagarðinum verður brúktur.

Ungdómstilboðið, sum læt upp í Sýsluni 1. januar í ár, er sera væl umtókt. Meir enn 120 børn og ung eru limir, og síðan latið varð upp aftur eftir summarsteðgin, hevur ungdómshúsið havt opið fimm kvøld um vikuna.

Skúlin. Í 2017 fór stórur partur av íløgujáttanini til skúlan. Tá var ovara hæddin førd út ájavnt við niðaru hæddina, soleiðis at vit hava fingið stórar og rúmligar skúlastovur, ið kunnu brúkast til nógv endamál. Svimjihylurin er frá 1974. Síðstu árini er onkrar umvælingar gjørdar. Millum annað er tekjan og allar el-leiðingar skiftar. Í heyst er nýggj ventilatiónsskipan sett upp í svimjihøllini, sum fer at hava við sær, at tað verður heitari inni, og at orkunýtslan fer at minka. Hetta arbeiðið er nærum liðugt.

Fótbóltsvøllurin á Dungasandi. Í mai mánaða í fjør var nýggi graslíkisvøllurin lagdur á, og við árslok var J&K farið undir at stoypa fundamentini til tær fýra 24-metrar ljósmastrarnar. Mastrarnar vórðu settar upp í apríl mánaða í ár, soleiðis at okkara fótbóltsvøllur nú lýkur tey strongu krøvini, UEFA setir viðvíkjandi ljósum.

Grundøki. Vit halda, at tað hevur stóran týdning, at kommunan gongur undan, soleiðis at tørvurin á grundstykkjum altíð er nøktaður. Seinasta kommunala útstykkingin í Sørvági var gjørd í Billubønum uml. 2008, og vit eru í uppisetri við grundøkjum. Sitandi bygdaráð fór alt fyri eitt í eina tilgongd at fáa keypt øki til útstykking. Hetta eydnaðist okkum. Og í fjør keyptu vit eitt nærum 35000 fermetrar stórt øki til útstykkingar, har pláss verður fyri umleið 30 sethúsum og møguligari íbúðarbygging. Í fyrsta umfari verður útstykkjað til uml. 18 grundstykki, sum við einum fríøki í miðjuni fara at hava útsýni út móti fjørðinum og oman í bygdina.

Peningur var settur av á fíggjarætlanini fyri í ár til hesa útstykking, men av ymsum orsøkum er tað ikki eydnast okkum at koma rættiliga í gongd. M.a. liggur ein háspenningslinja hjá SEV í økinum, sum má fáast burtur, innan KJO, ið skal gera útgrevstrararbeiðið, kann fara til verka. Peningur er aftur settur av til næsta ár, og vit vóna, at vit kunnu bjóða stykkini til sølu sum skjótast.

Bústaðir eigur fimm íbúðir í Billubønum. Kommunan hevur í ár keypt og planerað eitt grundstykki úti í Geilini í Sørvági, sum Bústaðir keypir frá okkum. Hetta merkir, at innan stutta tíð eru 10 leiguíbúðir í bygdini til tey, ið ikki vilja eiga, men heldur leiga.

Mykines. Vit høvdu vónað og væntað, at tað fór at verða søga síðst á sumri í ár, at neyðugt er at draga oljutunnurnar úr bátinum og niðan í bygdina í Mykinesi. Men leingi er tað, ið væl skal verða. Enn eru vit ikki komin á mál. Akfarið, ið skal koyra oljuna til viðskiftafólkini, er komið í oynna, og avrátt er, hvussu oljuflutningurin skal skipast. SEV yvirtekur oljutangan, ið fingin varð til vega fyri nøkrum árum síðani, og eitt av oljufeløgunum fer at selja til kundarnar.

Í vár var landsstýrismaðurin í samferðslumálum, Hendrik Old, við okkum á vitjan í Mykinesi og hugdi at viðurskiftum, ið kommunan hevur víst á hava ábøtur fyri neyðini. Vit fegnast um, at tað í summar var farið í gongd við at stoypa bakkaverjuna undir Fjørdalsgøtu. Gutti Guttesen stendur fyri arbeiðinum, og hann bíðar eftir veðurlíkindum, so tað síðsta tilfarið fæst út, so arbeiðið verður gjørt liðugt. Aftur í heyst hevur kommunan í skrivi til landsins myndugleikar víst á, at neyðugt verður sum skjótast at bøta um atløgusíðuna við m.a longdum bryggjukanti og girðing fram við, tí har er als ikki nóg trygt til stóra ferðafólkatalið í Mykinesi.

Spillivatnsviðurskifti. Hóast ásett var av landinum, at allar kloakkir skuldu leggjast út á streymasjógv í seinasta lagi í 2015, eru vit ikki komin endaliga á mál enn, hetta hóast munandi partar av økjunum í Sørvági vórðu savnaðir saman í ár. Kommunan hjá okkum fevnir um eitt stórt øki, og smáu bygdirnar eru nógv betur fyri, tá ið talan er um kloakkútlát.

Á heysti 2015 varð ein sundurgreinað spillivatnsskipan fyri Sørvág gjørd. Ætlanin fevnir serliga um økið frá Stórá og út á Bakka. Við hesum sum grundarlagi varð farið undir at leggja nýggjar leiðingar. Í 2016 var nýggj leiðing løgd í Skúlabrekkuna í samstarvi við SEV, eins og økið á Stakka partvís eisini varð lagt av nýggjum.

Spillivatnsskipanin verður javnan dagført og tillagað í mun til útbyggingar av bygdini annars.

Í 2017 fór Poul Sigmund undir at leggja kloakkleiðing frá kommunuskrivstovuni til nýggjan felagstanga, og vóru húsini oman til brúnna bundin í. Rør er lagt tvørtur um Konshylsbrúnna og oman í brunn á Dungasandi. Eisini var byrjað at leggja nýggja leiðing frá brúnni og niðan til felagstanga eystan fyri hjá Suna og Vivi. Pumpubrunnurin úti á Liðakletti er bundin heim til brúnna um Stórá.

Í ár er hildið áfram við arbeiðinum, soleiðis at stórt sæð allar kloakkirnar frá Geilini og heim í Stórá og niðan á Mýrar nú eru savnaðar saman. Arbeiðið heldur fram í 2019.



Reyð øki eru liðug í 2018

Í Bø var annað av tveimum frárenslurørum lagt út á sjógv í summar. Í heyst hendi tað keðiliga, at tað typtist, og neyðugt var at fáa hjálp frá Sp/f Fílinum at reinsa rørið. Kommunan heitir tí á fólk um at ansa eftir, so einki annað enn væta fer í frárenslið.

Asfaltering. Eitt umleið 2000 fermetrar stórt økið uttanfyri bygningin hjá Vestmek er asfalterað í ár. Ein partur av økinum verður brúkt til parkering, meðan restin er útleigað til tríggjar fyritøkur. Ætlanin er, at tær fyritøkur, ið eru á havnarøkinum, skulu hava eitt økið fram við berginum í part, so tær hava

eitt stað at seta frá sær. Hetta fyri at royna at halda havnarøkið meir ruddiligt. Fyritøkan hjá KJO er byrjað at reinsa rennuna fram við berginum. Nú í desember mánað er avtala gjørd við fyritøku um asfaltering av nøkrum vegastrekkjum. Tað er ein vegur í Billubøi, ein gøta á Kelduni og ein á Kvíggj, sum fáa asfalt á. Í Bø verður vegurin á Tungu asfalteraður.

Fíggjarliga gongdin í 2018

Skattainntøkurnar hava higartil í ár roynst betur enn mett í fíggjarætlanini fyri 2018. Sammeta vit fyrstu 11 mánaðirnir í 2017 og 2018, so var persónsskatturin 38.874.537 kr. í 2017 móti 40.144.814 kr. í 2018. Hetta er ein vøkstur upp á 1.270.277 kr., sum í prosentum svarar til 3,27. Endaligi skatturin verður tó ikki avroknaður fyrr enn um heystið árið eftir, og tá kunnu reguleringarnar broyta skattainntøkuna. Á heysti í fjør og í ár vístu hesar avrokningar, at okkara skattainntøkur gjørdust nærum eina mió. minni. Vit fáa væntandi nærum tvær milliónir meir í partafelagsfelagsskatti, enn mett var. Privatar og almennar fyritøkur, sum bera felagsskattin, kastaðu meiri av sær aftur í ár, so hetta avspeglar framgongdina, ið verið hevur í samfelagnum. Rakstrarútreiðslurnar hava hildið nøkulunda á øllum økjum. Raksturin plagar at vera á leið tað, ið samtykt er. Tó gjørdist økið 'Børn og ung' dýrari enn ætlað at reka. Grundina til tað finna vit serliga í vaksandi barnatalinum í barnaansingini og í vælumtókta undómstilboðnum, ið tilsamans góvu størri lønarútreiðslur enn ætlað. Tær eykajáttanir, ið gjørdust neyðugur at samtykkja síðst í árinum, eru fíggjaðar av tøkum peningi og við at flyta pening millum kontur.

Á myndini niðanfyri síggja vit kommunuskattin frá 2011 – 2018



Inntøkan fyri 2018 vísir 11 teir fyrstu mánaðirnar í árinum og mett, hvat inntøkan verður í desember.

P/F skattur 2011 – 2018



Fíggjarstøðan

Sum áður sagt frá, so hevur ikki verið møguligt í hesum árinum at fremja allar tær ætlanir, bygdaráðið hevði sett sær fyri, tí er allur peningurin, ið var settur av til løgur fyri '18, heldur ikki brúktur. Útstykkingin undir Middagsvarða, ið kravdi stóran part av íløgujáttanini fyri 2018, er ikki farin rættilig í gongd. Hóast tað helst ikki er rætt at meta um, hvussu stór nettoskuldin pr. 1. jan 2019 verður, tí tað fæst ikki at vita fyrr enn seinni, so kunnu vit varisliga siga, at hon verður umleið 14 mió. kr.

Nettoskuldin í mió. krónum pr. 1. jan					
Ár	2013	2014	2015	2016	2017
Mió. kr.	23.1	20.0	14.3	23.1	25.7

Eitt sindur um okkurt, ið eisini eigur at hava áhuga

Fólkatalið í kommununi er vaksandi og var 1. november í ár 1197. Í skrivandi stund eru vit fleiri enn 1200 borgarar. Hetta er fyrstu ferð nakrantíð, at fólkatalið er so høgt. Vit fegnast sjálvandi um hesa góðu gongd og ynskja, at hon heldur fram.

Fólkatalið í kommununi pr. 1. jan.						
Ár	2013	2014	2015	2016	2017	2018
Fólk	1084	1087	1079	1106	1128	1172

Á talvuni niðanfyri sæst, at fólkatalið í okkara kommuna er vaksið við 2,4 prosentum frá 1. nov. 2017 – 1. nov 2018. Tað er altíð hugaligt, tá ið fólkatalið er vaksandi.

Fólkatalið í kommununum

Broytingar í fólkatalinum 1. nov. 2017 - 1. nov. 2018

	Fólka-talið 1.nov. 2017	Fødd	Deyð	Burðar-avlop	Inn-lendis netto-flyting	Flutt úr Før-oyum	Flutt til Føroya	Netto-flyting tils.	Fólka-talið 1.nov. 2018	Broytt í tali	Broytt í %
Alt landið	**50.322**	**673**	**403**	**270**	**0**	**1.188**	**1.833**	**645**	**51.237**	**915**	**1,8**
Fugloyar	39	0	1	-1	0	1	0	-1	37	-2	-5,1
Viðareiðis	355	5	0	5	-24	3	28	1	361	6	1,7
Hvannasunds	415	4	6	-2	-6	7	10	-3	410	-5	-1,2
Klaksvíkar	5.114	86	51	35	-21	117	174	36	5.185	71	1,4
Kunoyar	142	1	3	-2	2	10	14	6	146	4	2,8
Fuglafjarðar	1.529	19	8	11	-12	29	28	-13	1.527	-2	-0,1
Eystur	2.080	29	17	12	-4	23	49	22	2.114	34	1,6
Nes	1.267	20	5	15	17	28	54	43	1.325	58	4,6
Runavíkar	3.934	55	22	33	9	89	138	58	4.025	91	2,3
Sjóvar	1.030	19	9	10	8	21	41	28	1.068	38	3,7
Eiðis	713	15	5	10	-7	10	20	3	726	13	1,8
Sunda	1.747	26	8	18	14	50	65	29	1.794	47	2,7
Tórshavnar	21.024	279	159	120	71	616	964	419	21.563	539	2,6
Kvívíkar	593	10	4	6	-7	9	14	-2	597	4	0,7
Vestmanna	1.223	11	8	3	-23	17	37	-3	1.223	0	0,0
Vága	2.054	33	21	12	-1	31	41	9	2.075	21	1,0
Sørvágs	1.169	19	11	8	13	22	29	20	1.197	28	2,4
Skopunar	461	3	6	-3	-2	7	10	1	459	-2	-0,4
Sands	520	5	6	-1	8	11	8	5	524	4	0,8
Skálavíkar	142	1	1	0	-8	0	3	-5	137	-5	-3,5
Húsavíkar	117	1	6	-5	1	2	1	0	112	-5	-4,3
Skúvoyar	42	0	0	0	1	0	0	1	43	1	2,4
Hvalbiar	682	5	9	-4	-2	5	2	-5	673	-9	-1,3
Tvøroyrar	1.717	9	12	-3	-11	39	41	-9	1.705	-12	-0,7
Fámjins	82	0	0	0	-2	2	0	-4	78	-4	-4,9
Hovs	97	3	0	3	1	0	1	2	102	5	5,2
Porkeris	313	2	4	-2	-1	0	10	9	320	7	2,2
Vágs	1.364	8	18	-10	-13	34	38	-9	1.345	-19	-1,4
Sumbiar	357	5	3	2	-1	5	13	7	366	9	2,5

Kelda: Hagstova Føroya

Læknaviðtalan í Sørvági letur aftur frá 1. januar 2019. Hølini, ið hava verið lítið brúkt síðstu tíðina, eru ótíðarhóskandi sambært teimum øktu krøvum, ið sett verða til viðtaluhøli. Hetta merkir, at borgarar í kommununi skulu til viðtalu í Heilsudeplinum í Miðvági. Vit heita á tey, ið ikki hava/fáa flutning til Miðvágs, um at venda sær á skrivstovuna hjá okkum. Ætlanin er ikki, at vit skipa fyri flutninginum, men kommunan vil átaka sær at rinda fyri kvittaða rokning frá buss- ella hýruvognsførara.

Barnaverndartænastan í Vágum, ið virkar sambært lóg, er samstarv millum kommunurnar í oynni. Endamálið við barnaverndartænastuni er at tryggja, at børn, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, fáa neyðuga hjálp og umsorgan í rættari tíð, og at hjálpa teimum við at fáa ein tryggan uppvøkstur. Dentur verður lagdur á at finna loysnir, sum eru bestar fyri barnið. Lógin fevnir um ófødda barnið og øll børn og ung í aldrinum frá 0 til fylta 23. árið, ið eru stødd í Føroyum. Allir borgarar hava fráboðanarskyldu, og fakfólk hava skerpaða fráboðanarskyldu. Nærri kunning á: http://www.bvs.fo/

Barnaverndartænastan hevur eisini ábyrgd av **SSP-samstarvinum** í Vágum. SSP er ein tvørfaklig samstarvsskipan millum fakbólkar, ið virka millum børn og ung. Endamálið er at savna, samskipa og fremja felags fyriskipanir, ið skulu fyribyrgja kriminalitet og skaðandi atburð. Nærri kunning á: http://www.bvs.fo/ssp

Vitjanartænasta og sambinding. Sørvágs og Vága kommunur hava gjørt avtalu við Reyða Kross Føroya um at hava hesar fyriskipanir í oynni. Um tú heldur, at tær ella onkrum øðrum, tú kennir, tørvar vitjan, ella tú hevur hug at gerast vitjanarvinur, ert tú vælkomin at seta teg í samband við fyrisitaran í **vitjanartænastuni**, Onnu S. Nordendal á tlf.nr. 332705/272142.

Endamálið við integratiónstiltakinum **sambinding/intertwining** er, at tilflytarar og føroyingar hittast, hugna sær saman og læra av hvørjum øðrum. Skipað verður fyri tiltøkum á bókasøvnunum nakrar ferðir um árið. Fyriskiparar í okkara kommunu eru Anna Sophie, Marna og Liz Castillo.

Umhvørvisplássið (bingjuplássið). Tað er ókeypis at sleppa av við burturkast frá húsarhaldinum á umhvørvisplássinum. Heitt verður á fólk um at skilja burturkastið væl, ikki at seta rusk uttanfyri plássið og um at leiga bingju frá IRF, um tey hava nógv burturkast t.d. í sambandi við bygging, umbygging ella annað. Eru ivamál, so hevur IRF ein góða og kunnandi heimasíðu: http://irf.fo/

Fyri at lætta um hjá borgarum okkara, hevur kommunan í ár keypt eina trýstbingju, sum er umhvørvisvinarligari og lættari atkomilig enn verandi bingjur.

Opið er soleiðis: týsdag kl.17-18, fríggjadag kl. 17-19 og leygardag kl. 16-18

Fíggjarætlanin 2019

Sørvágs bygdaráð samtykti á bygdaráðsfundinum mikukvøldið hin 28. november 2018 fíggjarætlanina fyri 2019.

Hesi eru høvuðstølini:

Mett skattainntøka:	43.470.000,-	
P/F skattur:	3.500.000,-	
Skattur av eftirlønarinngjaldi:	9.083.000,-	
Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir:	4.139.000,-	
Útvegan av gjaldføri		
Tøkur peningur:	5.000.000,-	
Lánsgjald:	1.418.000,-	
Tilsamans:	66.610.000,-	
Rakstur:		46.123.000,-
Afturgjald av skuld:		4.497.000,-
Til íløgur:		15.990.000,-
Fíggjarætlanin javnvigar við:		66.610.000,-

Skattaprosentið verður óbroytt 21,7%.

Barnafrádrátturin verður eisini óbroyttur kr. 6.000,-

Samsvarandi fíggjarætlanini fyri 2019 er ætlanin at gera íløgur fyri uml. 15.990 mió. kr. Tað er nógvur peningur, og sum tað sæst omanfyri, so verða íløgurnar fíggjaðar við góðum 9. mió. í rakstrinum, 5 mió. verða útvegaðar av tøkum peningi, meðan restin sløk 1.5 mió. verður fíggja við lántøku. Bygdaráðið metir, at hetta eru neyðugar íløgur. Tær eru innan hesi øki:

Almanna- og heilsumál:	2.340.000,-
Børn og ung:	5.700.000,-
Undirvísing:	450.000,-
Mentan og frítíð:	200.000,-
Teknisk mál:	7.000.000,-
Kommunal virki:	300.000,-

Størsti parturin av íløgujáttanini fyri 2019 fer til økini almanna- og heilsumál, børn og ung og tað tekniska.

Heimið á Sýnini er ikki blivið so kostnaðarmikið, sum tað onkuntíð hoyrist millum manna. Enn heldur upprunaligi kostnaðurin. Sum áður sagt, er peningurin, ið settur var av á fíggjarætlanini fyri 2018, ikki brúktur til umvælingina enn, so vit hava aftur sett pening av fyri næsta ár til síðsta og endaliga arbeiðið, ið skal fáa heimið liðugt. Tó vænta vit, at neyðugt verður at játta eina minni eykajáttan næsta ár.

Alvalon gjørdist bráddliga okkara stóra avbjóðing. Tá ið barnagarðurin var bygdur og tikin í nýtslu fyri góðum 12 ár síðani, var hildið, at vit høvdu bygt ein so stóran stovn, sum fór at nøkta tørvin á plássum nógv, nógv ár fram í tíðina. Men so var ikki. Vit síggja nú, at har er plásstrot, og at tað er alneyðugt at útbyggja stovnin sum skjótast. Kommunan keypir í ár eitt 6088 fermetrar stórt øki omanfyri Alvalon, og fyrireikingararbeiðið at útbyggja verður byrjað sum skjótast næsta ár. 5.6 mió. kr. eru settur av til hesa útbygging.

Sýslan verður nógv brúkt. Um dagin ganga uml. 15 børn úr 1. - 3. flokki í frítíðarskúla í bygninginum, og um kvøldarnar verður hann brúktur sum ungdómshús. Neyðugt er at viðlíkahalda ein so gamlan bygning, ið verður so nógv brúktur. Næsta ár er ætlanin at drena rundanum grundina og pussa hana.

Serstovan í skúlanum skal eisini útbyggjast eitt sindur. Allir teir uml. 10 næmingarnir í Vágum, ið hava tørv á einum serligum skúlatilboði, ganga her í okkara skúla, og brúk er fyri einum bólkarúmi afturat. Í tí sambandi er kirkjuráðið í ferð við at burturbeina kirkju-oljufýringina, sum stendur uppi í skúlanum, og at byggja ein lítlan bygning upp í kirkjuhúsið til aðra orkukeldu.

Skúlin í Gásadali fekk nýggj hvít vindeygu í fjør. Ætlanin er, at loftið skal setast í stand, so gásadalsfólk og avbygdafólk við tilknýti til bygdina hava eitt stað at samlast til smærri tiltøk, har tey eisini kunnu gera sær ein drekkamunn.

Krígsavnið er komið í ta støðu, at tað verður heimleyst innan stutta tíð. Tað hevur fingið boð frá eigaranum av hølinum, har tað er staðsett nú, at leigumálið verður uppsagt. Savnið hevur tí søkt um peningahjálp frá báðum kommununum í Vágum, so SOR-bygningurin kann gerast so frætt í stand, at tað kann flyta inn har í mai mánaða. Kommunurnar hava játtað at veita krígssavninum upp til kr. 600 tús. í stuðli í part.

Ferðavinnan í Føroyum er alsamt vaksandi, og í okkara kommunu eru náttúruperlur, ið øll ferðafólk ynskja at vitja. Kommunan hevur sett pening av til ferðavinnumenning. Hesin verður helst brúktur í samstarvi við Visit Faroe Islands, sum so eisini rindar ein part av møguligum verkætlanum.

Spæliplássið **á Stakka**, har atlit eru tikin at samveru millum børn og foreldur, var liðugt á sumri 2017 til gleði fyri bæði børn og vaksin. Í ár samtykti bygdaráðið uppskot frá Westtech, sum umfataði hina helvtina, ið er ætlað til hugna og samkomur fyri yngra og eldra ættarliðið. Tíverri komu vit ikki á mál við ætlanini.

Vit seta okkara álit á, at hetta arbeiðið verður liðugt í summar, tá bæði country & blues-festivalur og vestanstevna verður í Sørvági.

Størsti parturin av byggibúningini fer til útstykkingina undir Middagsvarða – góðar 6.2 mió. kr.

Hesi bæði síðstu árini eru lutfalsliga stórur partur av krónunum til íløgur farin til dagføring av spillivatnsætlanini. Fyri næsta ár hava vit sett 700 tús. kr. av til framhaldandi dagføringar.

Peningur er eisini settur av til arbeiði at dagføra byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi. Byrjað varð í ár við tí fyri Gásadal. Eisini er ætlanin at fáa lagt til rættis, hvussu okkara miðstaðarøki skal síggja út í framtíðini. Til hesar báðar ætlanir eru avsettar kr. 450 tús.

Av øðrum íløgum kann nevnast, at gøtuljós fyri uml. 100 tús. kr. skulu setast upp uppi á Reyni, har gamli svimjihylur var. Starvsfólk í Alvalon brúka økið til parkering, og har er sera myrkt á vetri. Eisini fara vit at skifta eini 30 gøtuljós í bygdunum til orkusparandi LED-ljós. Ætlanin er at gera tað í smáum, soleiðis at vit brúka uml. 100 tús. hvørt ár til hetta.

Eisini eru kr. 300 tús. settar av til nýggjan átaksleiðarabil til Sørvágs sløkkilið.

Bygdaráðsfundir 2019.

Bygdaráðið hevur ásett føstu bygdaráðsfundirnar fyri 2019. Fundirnir verða kl. 17:00 í fundarhølinum á kommunuskrivstovuni niðanfyri nevndu dagar.

Mikukvøldið 23. januar

Mikukvøldið 27. februar

Mikukvøldið 27. mars

Mikukvøldið 01. mai

Mikukvøldið 22. mai

Mikukvøldið 26. juni

Mikukvøldið 04. september

Mikukvøldið 25. september

Mikukvøldið 30. oktober

Mikukvøldið 13. november

Mikukvøldið 27. november

Mikukvøldið 11. desember

Mál, sum skulu verða viðgjørd á bygdaráðsfundi, skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri fundin.

Eykafundir ella broytingar í skránni verða lýstir á svørtu talvu á kommunuskrivstovuni og á heimasíðuni hjá Sørvágs kommunu.

At enda

2018 er av álvara farið at halla, og brátt skriva vit 2019.

Vit vita sjálvandi ikki, hvussu 2019 fer at vignast, men vit fara við góðum treysti inn í tað nýggja árið og taka við teim uppgávum og avbjóðingum, sum tað nú einaferð fer at geva okkum.

Vit, sum eru vald í bygdaráðið, vilja altíð og eftir bestu sannføring stjórna allari kommununi so væl, sum til ber. Endamálið er, at í okkara kommunu skal vera gott bæði at búgva og virka.

Til seinast fari eg vegna bygdaráðið og starvsfólk okkara at ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

Sørvági, hin 20. desember 2018

Vinarliga

Sørvágs kommuna

Aimé Jacobsen

Aimé Jacobsen, borgarstjóri

Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlanina fyri 2019

		Játtan Rakstur og útlán		
	Túsund kr.	**Útreiðslur**	**Inntøkur**	**Løgur**
§1.	**Kommunal fyrisiting**	**3.899**	**-**	**-**
	11. Felagsútreiðslur	3.899	-	-
§2.	**Almanna- og heilsumál**	**16.712**	**-**	**2.340**
	20. Heilsumál	1.302	-	-
	21. Almannamál	15.410	-	2.340
§3.	**Børn og ung**	**8.907**	**-**	**5.700**
	26. Barnaansing	8.907	-	5.700
§4.	**Undirvísing**	**4.213**	**-**	**450**
	23. Útbúgving og gransking	4.213	-	450
§.5.	**Mentan og frítíð**	**3.343**	**-**	**200**
	23. Útbúgving og gransking	608	-	-
	24. Mentan	2.735	-	200
§ 6.	**Teknisk mál**	**4.399**	**-**	**7.000**
	11. Felagsútreiðslur	1.313	-	700
	22. Íbúðarmál	-	-	6.750
	24. Mentan	145	-	-
	30. Umhvørvi	720	-	700
				-
	37. Handil og vinna annars	-	-	1.550
	38. Samferðsla og samskifti	2.221	-	400
§ 7.	**Kommunal virki**	**3.822**	**-**	**300**
	30. Umhvørvi	2.291	-	-
	31. Tilbúgving	771	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	760	-	300
	Tilsamans	**45.295**	**-**	**15.990**
§				
20.	22. Íbúðarmál	650	-	-
	35. Sjóvinna	-	-	-
	50. Rentur	178	-	
	52. Skattir og avgjøld	-	60.192	-
	Tilsamans	46.123	60.192	15.900
	Yvirskot	-	14.069	-
		Útreiðslur	**Inntøkur**	**Yvirskot**
	Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÙ	**-**	**-1.921**	**-**
§25.	60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	-	5.000	-
	Nettokassaúrslit	**-**	**3.079**	**3.079**
§25.	62. Afturgjald av skuld	4.497	-	-
				-
	Bruttokassaúrslit	**4.497**	**3.079**	**1.418**
	Fígging:			
§25.	64. Útvegan av gjaldføri	-	1.418	-
	Fíggjan í alt:	-	1.418	1.418
	Samanlagt	**4.497**	**4.497**	**-**

Høvuðsyvirlit yvir roknsskapin fyri 2017

		Játtan		
		Rakstur og útlán		
	Túsund kr.	Útreiðslur	Inntøkur	Løgur
§ 1.	**Kommunal fyrisiting**	**3.667**	**-**	**-**
	11. Felagsútreiðslur	3.667	-	-
§ 2.	**Almanna- og heilsumál**	**15.698**	**-**	**-2.566**
	20. Heilsumál	1.461	-	-
	21. Almannamál	14.238	-	-2.566
§ 3.	**Børn og ung**	**8.112**	**-**	**99**
	26. Barnaansing	8.112	-	99
§ 4.	**Undirvísing**	**4.168**	**-**	**6.977**
	23. Útbúgving og gransking	4.168	-	6.977
§. 5.	**Mentan og frítíð**	**2.381**	**-**	**6.627**
	23. Útbúgving og gransking	656	-	-
	24. Mentan	1.725	-	6.627
§ 6.	**Teknisk mál**	**3.956**	**-**	**6.370**
	11. Felagsútreiðslur	975	-	1.874
	22. Íbúðarmál	-	-	3.306
	24. Mentan	82	-	-
	30. Umhvørvi	659	-	873
	37. Handil og vinna annars	-	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	2.240	-	317
§ 7.	**Kommunal virki**	**3.844**	**-**	**446**
	30. Umhvørvi	2.544	-	-
	31. Tilbúgving	711	-	-
	38. Samferðsla og samskifti	589	-	446
	Tilsamans	**41.827**	**-**	**17.952**
§ 20.	22. Íbúðarmál	688	-	-
	35. Sjóvinna	-	-	-
	50. Rentur	455	2	
	52. Skattir og avgjøld	-	58.291	-
	Tilsamans	42.969	58.293	17.952
	Rakstrarúrslit	-	**15.324**	-
		Útreiðslur	**Inntøkur**	**Yvirskot**
	Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÙ	**-**	**-2.628**	**-**
§ 25.	60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m."	-6.332	252	-
	Nettokassaúrslit	**-6.332**	**-2.376**	**3.955**
§ 25.	62. Afturgjald av skuld	3.159	-	-
	Bruttokassaúrslit	**-3.173**	**-2.376**	**796**
	Fígging:			
§ 25.	64. Útvegan av gjaldføri	-	-796	-
	Fíggjan í alt:	-	-796	-796
	Samanlagt	**-3.173**	**-3.173**	**-**